## DAGSINS MEINING

# Glottar

Hóast viðurskiftini á altjóða pallinum nú leingi hava verið døpur við kríggi og ófriði víða hvar, eru nakrir glottar at hóma. Í gjár frættist, at kurdiska mannarættindastríðskvinnan Laila Sama var sloppin úr fongsli. Laila Sama, ið er rithøvundur, hevur sitið føst í turkiskum fongsuli í tíggju ár. Orsøkin er, at hon í orð og tal hevur stríðst fyri mannarættindum hjá kurdisku tjóðini innan turkisk landamørk. Laila Sama hevur fingið fleiri altjóða virðislønir og hevur verið innstillað til Nobelfriðarheiðurslønina. Í mong ár hava Amnesty og ymsir felagsskapir eitt nú altjóða rithøvundafelagið stríðst fyri, at Laila Sama skuldi sleppa úr fongslinum. Nú er hetta eydnast, og øll orsøk er til at fegnast. Kanska er hetta eitt tekin um, at Turkaland hevur tikið enn eitt stig mótvegis veruligum fólkaræði.

Ein annar glotti er tað, sum júst er hent í trygdarráðnum í ST, har øll limalond loksins kundu semjast um eina felags støðu til Irak. Trygdarráðið hevur einmælt samtykt, at politiska valdið í Irak aftur skal latast irakska fólkinum. Hetta er ein sera týðandi hending. Henda avgerð merkir, at altjóða samfelagið nú hevur givið ST allar heimildir í Irak. Tað er nú ST og ikki USA, sum í hvussu so er á pappírinum hevur avgerandi orðið at siga í Irak. So er sjálvsagt spurningurin, um USA fer at virða hesa samtyktina hjá trygdarráðnum. Tað eru allar orsøkir til at vænta, at hetta fer USA atgera, tí landið eigur stóran part av orðaljóðinum í samtyktini.

Fyri europæisku fólkaræðini hevur samtyktin ómetaligan týdning við tað, at hon nú so at siga legaliserar tað, sum hendir í Irak. Nú er so eftir at tryggja, at kósin fram móti einum fólkaræðiligum Irak kann setast og haldast. Hetta verður alt annað enn lætt, men tann breiða altjóða semjan skuldi verið ein góð trygd fyri, at henda verkætlan kann eydnast.

**Sosialurin**

# Opið bræv

**til Sosialráðgevarafelag Føroya og føroysku fjølmiðlarnar**



**Hans Pauli Strøm**
*landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum*

Mánadagin 7. juni sendi Sosialráðgevarafelag Føroya undirritaða eitt opið bræv í sambandi við sparingar á Almannastovuni. Brævið var prentað í Dimmalætting og Sosialinum týsdagin 8. juni.

Í brævinum ger Sosialráðgevarafelag Føroya vart við, at Almannastovan tey seinastu 3 árini hevur arbeitt fyri at kunna veita borgaranum eina betri tænastu. Tænastustigið til borgaran er eftir tógvið stríð munandi betri, enn tað var fyri nøkrum árum síðani. Eg eri samdur í hesi staðfestingini, at stór menning er farin í skipan og virksemi hjá Almannastovuni.

Harumframt verður í brævinum upplýst, sum rætt er, at Almannastovan skal spara hálva millión, umframt at ikki er lagt upp fyri lønarhækkingunum í seinastu sáttmálasamráðingunum.

Eisini verður í brævinum spurt um, hvussu hetta letur seg gera. Og um landsins politikarar og undirritaði eru áhugaðir í at varðveita vælferðarsamfelagið.

Til tann fyrsta spurningin er at siga, at eg ikki eri samdur í avgerðini hjá løgtingsins fíggjarnevnd um at skerja játtanina til Almannastovuna við hálvari millión. Lat meg í stuttum greiða frá, hví eg eri ósamdur við fíggjarnevndini í hesari avgerð.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur stovnsett ein nýggjan stovn fyri fjølbrekað børn, Dagtilhaldið í Rók í Eysturoynni. Hesin stovnur hevur síðani 2001 verið ein royndarskipan, men virkar nú sum ein fastur stovnur. Raksturin av hesum stovni er lagdur inn í raksturin hjá Almannastovuni. Fíggjarnevndin legði ikki uppfyri hesari nýggju útreiðsluni, tá játtanin til Almannastovuna varð skerd við hálvari millión, hóast hon varð kunnað um hesa misskiljing.

Játtanin til Almannastovuna átti ikki at verið skerd við hesari hálvu milliónini, og eg ætli mær at taka hetta málið upp í samgonguni, og ætli mær av øllum alvi at arbeiða fyri, at hendan misskiljing verður rættað á fíggjarlógini fyri 2005.

Hinvegin mugu vit ásanna, at játtanin til Almannastovuna eins og til flestallar aðrar almennar stovnar í landinum ikki er nóg stór til lønarhækkingarnar, sum alment sett starvsfólk fingu eftir seinastu lønarsamráðingarnar. Hetta er ein politisk avgerð, sum samgongan, eisini undirritaði, hevur tikið. Og her má Almannastovna sostatt bera somu tungu lagnu sum aðrir almennir stovnar.

Til spurningin um, um landsins politikarar og undirritaði eru áhugaðir í at varðveita vælferðarsamfelagið, er sjálvsagt bert eittans svar. Og tað er játtandi.

Almannastovan hevur ein aðalleiklut í okkara vælferðarskipan. Fyri at varðveita góðar vælferðartænastur mugu vit varðveita eina góða Almannastovu.

Hennara uppgáva er at bera víðari tær tænastur, sum politiski myndugleikin hevur avgjørt, at landins borgarar skulu hava. Tað er upp til Almannastovuna at syrgja fyri, at so stórar og umfatandi lógir sum forsorgarlógin, pensjónslógin og dagpeningalógin, við øllum teirra reglum um tænastur til borgaran, verða hildnar og at ásetingarnar í hesum lógum verða framdar í gerð. Hetta er ikki løtuverk. Og heldur ikki ókeypis.

So Almannastovan eigur at fáa hesa hálvu milliónina, sum av misgáum varð tikin burtur í ár, aftur í 2005. Hesum fari eg at arbeiða fyri. Tí tær tænastur, sum Almannastovan veitir øllum landsins borgarum, summum meira og summum minni, kunnu vit sum menniskju og sum samfelag ikki vera fyriuttan. So vóru vit ikki longur eitt vælferðarsamfelag, men eitt samfelag uttan tað neyðuga trygdarnetið at lofta teimum, sum onkursvegna koma illa fyri í tilveruni.

Einari tílíkari gongd strembar eingin eftir, allarminst undirritaði. Eg kann bert lova at gera mítt besta.

# Høgni Hoydal fær øsing í, og tá danir reagera, fær Hermann Oskarsson skyldina

**Hanna Lisberg**
*Tórshavn, 6. juni 2004*



Tað er nógv fyri, at fólk skulu noyðast at draga síni gomlu veiku foreldur – abbar – ommur og onnur skyldfólk fram í bløðini.

Fyri stuttum hendi tað aftur, at tvey fólk sóu seg noyddan at finnast at, hvussu illa mammur teirra vóru fyri, tí einki ansingar stað fanst til teirra.

Onnur mamman er nú farin í Harrans hendur. Eg havi samkenslu við teimum, samstundis sum eg skammist av, at viðurskiftini eru slík í Føroyum. Hvar enda vit?

Sjálvandi frøddust vit, at støðan við blokkinum – nú teir ikki fóru at skera meira av blokkinum, enn gjørt varð í seinastu samgongu. Nú vóna vit og ynskja, at brúkt verður av blokkinum. Pláss má gerast fyri teimum, sum ikki klára seg. Eins og tey bæði, sum vístu á tørvin, eru vit fleiri, sum hava skyldfólk og næstringar, sum púra óhjálpin liggja og bíða. Vit vóru mong, sum øtaðust, tá danskir politikarar tóku so dýran til! Hvat var hent! Jú, loysingarhetjan, sum tapti valið, fór til Danmarkar at fáa danir at hjálpa sær. Tá so hesir gera vart við seg, ger Høgni Hoydal tað, sum hann er vanur: »Hví leika danir so í?« og sær ógvuliga ósekur út! Tað hevði verið meira mansligt at viðgingið, at tað var hann, sum løddi og festi í. Men hvør hevur fingið skyldina? Hermann Oskarsson! Hvat hann hevur sagt um blokkin, veit eg ikki. Ongastaðni síggja vit, at danir vísa á, at Føroya fólk hevur talað og vrakað Høgna Hoydal! Vit vilja ikki missa blokkin.

At Hermann er illur, tí røktarpláss ikki eru til okkara gomlu og veiku, eru vit nógv, ið taka undir við. Men eg vóni ikki, at hann heldur, at blokkurin er skaðiligur. Hann er m.a. ætlaður til almannamál.

Vónandi skilja danir, at tað er ikki andstøðan, sum skal til Danmarkar at fáa »hjálp« og øsing. Eg vóni, at samgongan skilir, hví vit vildu sleppa av við slík klandursvætti!

Vit krevja skjóta hjálp til tey hjálparleysu í Føroyum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Blokkstuðulin: Maðurin skal fellast, men hvar fór bólturin?

**Bjarni Olsen**



**Vit mugu kunnu krevja, at politikarar, sum hava fingið litið ábyrgdarsessir upp í hendi, duga at halda høvdið kalt og varðveita sakligheitina, so almenn niðurgering og útspilling ikki skaðar talufrælsið. Og lat okkum so venda aftur á slóðina og nema við búskaparligu viðurskiftini, sum Herman Oskarsson hevur umrøtt.**

Hví verður Hermann Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum, niðurgjørdur, útspiltur og gjøgnumheglaður fyri alment at viðgera búskaparliga sera týðandi viðurskifti fyri samfelagsbúskapin? Er tað ikki júst hansara uppgáva?

Sjálvandi er tað hansara uppgáva, men tað er ikki trupult at skilja, hví øsingin verður so ógvuslig. Bæði blokkurin og fiskimannaskatturin hava beinleiðis ávirkan á inntøkubýtið í samfelagum, og tá skal, sum rímuligt er, lítið til, at fólk, ella kanska heldur menn, gerast heitir. Eg kenni sjálvur til fyribrigdið m.a. sum fyrrverandi formaður í Búskaparráðnum. Tað er eitt fyribrigdi, sum ein og hvør, ið vil úttala seg, má rokna við. Men vit mugu kunnu krevja, at teir politikarar, sum hava fingið litið ábyrgdarsessir í hendi, halda høvdið kalt og varðveita sakligheitina, so hetta keðiliga og órímiliga fyribrigdið ikki skaðar talufrælsið.

Hermann - og Astrup - hava meir enn tey flestu tikið týðandi samfelagsbúskaparlig evni upp til viðgerðar í almenninginum. Vit hava brúk fyri fólkum sum teir báðar, tí tað er umráðandi, at vit hava eitt livandi og sakligt samfelagskjak uttan mun til, um vit eru samd við teir ella ikki. Og í sambandi við blokkstuðulin mugu vit kunna tola, at kjak eisini tekur seg upp í Danmark. Tað er hóast alt haðani, blokkstuðulin kemur!

Men hvat við at venda aftur á slóðina? Hvørji evni viðgjørdu teir báðir? Eg skal beinanvegin viðganga, at eg eri millum teirra, sum ikki var á ráðstevnuni, har teir løgdu fram síni sjónarmið, so eg noyðist eins og tey flestu at taka støði í tí, sum er komið fram í bløðum o.ø. Niðanfyristandandi er tað, sum eg havi fingið burturúr.

### Blokkstuðulin var høvuðsevnið

Føroyar fáa í dag góðar 600 mkr. í árligum blokkstuðuli úr Danmark og nakað afturat til rakstur av rættarskipan, politii osfr., tilsamans 1 mia. kr. árliga.

Hermann sigur, at vit brúka ikki statsstuðulin í dag, og vísir til, at tað sæst av tjóðarroknskapinum. Uttan at vita tað giti eg, at hann meinar við, at avlopið á føroyska gjaldsjavnanum er umleið líka stórt sum árligi statsstuðulin. Hetta merkir, at føroyskir borgarar og fyritøkur plasera líka nógvar pengar uttanlands árliga, sum verður latið í stuðuli úr Danmark árliga. Eg skilji Hermann sum, at hann meinar, at tað hevur við sær, at "blokkurin kann koyrast vekk uttan, at samfelagið í síðsta enda verður verri fyri enn í dag".

Eg kundi hugsað mær, at Hermann greiddi nærri frá, hvussu hetta skal ganga upp. Um statstuðulin fellur burtur, so mugu annaðhvørt landskassaútreiðslurnar minka, landsskatturin økjast ella bæði. Uttan mun til hvat verður gjørt, ávirkar tað samfelagsvirksemið negativt. Úrslitið verður óivað eisini, at gjaldsjavnaavlopið minkar. Hetta mótvirkar fyrrevndu afturgongd, men fyri mær at síggja, er ongin trygd fyri, at vit enda við sama virksemi í samfelagnum sum í dag ella at hall ikki verður á gjaldsjavnanum. Eg lati meg tó fegin sannføra!

### Vinnustuðul var eitt annað evni

Tað hevur ofta verið nevnt, at ein grund til, at vit í Føroyum eru so "hervilig" til at fara undir stuðulsskipanir, er, at blokkurin ger, at vit ikki noyðast at raðfesta so neyvt við tí úrsliti, at stuðulsskipanir lættari koma gjøgnum politiskt. . Eg trúgvi ikki, at orsøkin til stuðulsskipanir í Føroyum gjøgnum tíðirnar er stuðulin úr Danmark, men heldur at politikararnir hava meint og framvegis meina, at tað er best fyri føroyska samfelagið at veita stuðul. Í stuttum kann sigast, at føroyskir politikarar - og føroyingar yvirhøvur - ikki so gleivbeintir sum vit búskaparfrøðingar taka undir við, at ein fult liberaliseraður búskapur gevur besta úrslit fyri samfelagið. Vit hava framvegis eina stóra uppgávu at sannføra føroyingar um, at liberalisering er gongdin frameftir. Men vit mugu vera eins treisk, og tey hava verið í øðrum londum, tí har hevur tað eisini tikið nógv ár at fáa undirtøku fyri hesum. Tað tekur tíð, men tað eydnast helst at enda.

At enda ein viðmerking til uppskotið hjá Astrup um, at blokkstuðulin skal regulerast í mun til fíggjarliga gongdina/tørvin í Føroyum. Hetta er onki nýtt uppskot. Tað munnu vera minst 30 ár síðani, eg fyrstu ferð hoyrdi um tað, men tað er helst eldri enn so. Seinast varð tað viðgjørt í sonevndu Gørtz-frágreiðingini, sum varð gjørd í sambandi við kreppuna í 1992. Har fekk tað ikki gott viðmæli, serliga ti tað hevur við sær skeiva tileggjan (incitament). Tá verður hugurin hjá okkum føroyingum til at fáa búskapin at ganga væl ikki so stórur, tí so minkar stuðulin. Christian Schultz, danskur professari í búskapi, hevur skotið upp at javna stuðulin eftir gongdini í altjóða fiskaprísunum (heldur ikki hesir tankar eru nýggir). Harvið slepst uttan um, at stuðulsmóttakarin sjálvur, t.e.føroyingar, kann ávirka, hvussu stórur stuðulin skal vera. Eg kann ikki siga, at eg haldi so nógv um hetta uppskotið heldur. Higartil hava alivinnan og rækjuflotin ikki fingið stuðul fyri at klára seg gjøgnum kreppuna. Hetta grundar seg m.a. á, at semja sum heild er um, at fortreytin fyri vinnuligum virksemi má vera at vinnan megnar at standa á egnum beinum. Vansin við einum statsstuðli, sum verður javnaður eftir fiskaprísum, er m.a., at hann kann koma at fasthalda ein vinnuligan struktur, sum onga framtið hevur.

### Sjómansskatturin hevur avleiðingar

Allur vinnuligur stuðul er við til at fasthalda eitt vinnumynstur, ið kanska átti at verði broytt. Tær vinnur, sum fáa stuðul, fáa við stuðlinum møguleika til at draga m.a. arbeiðsmegi og kapital til sín, sum annars kundi verið nýtt í øðrum vinnum. Stuðulin er við til at trýsta lønir og fíggjarkostnað upp, so tær vinnur, sum annars klára seg uttan stuðul, fáa trupult við at hóra undan.

Lat okkum hugsa okkum, at vit høvdu ein vinnu, sum framleiðir t.d. bildekk, har starvsfólkini bert skulu gjalda helvtina so nógv í inntøkuskatti av tí, sum aðrar borgarar gjalda. Tá er lætt at skilja, at ein slík vinna hevði megnað at drigið arbeiðsmegi til sín, hóast hon ikki megnar at geva somu løn sum aðrar vinnur og harvið í roynd og veru ikki forrentar seg eins væl og aðrar vinnur. Fyri at fáa arbeiðsmegi høvdu aðrar vinnur verið noyddar at boðið væl hægri í løn enn marknaðarlønina, skal ikki øll arbeiðsmegin fara til dekkvinnuna. Tess meira dekkvinnan fyllir í búskapinum, tess størri trupulleikar fyri búskapin av hesari skattaskipan.

Sjómansskatturin virkar á sama hátt í búskapinum. Harvið havi eg ikki sagt nakað um, at eg ikki unni sjómonnum okkara lágan skatt, at sjómenn okkara ikki eiga at fáa góðar sømdir, tí teir hava harðar og langar arbeiðsdagar burtur frá familjuni osfr. Ein kundi unt øllum lægri skatt, meira í pensión, meira í løn osfr. Eg meini bara, at dømið vísir okkum greitt, at sjómansskatturin hevur samfelagsbúskaparligar avleiðingar. Tað er tað, sum eg fyrihaldi meg til og ikki moralskar spurningar. Tað er best fyri samfelagsbúskapin, at vinnan dregur arbeiðsmegi til sín í samsvar við hennara inntjeningsevni og ikki í mun til, hvussu tey, sum arbeiða í henni, verða skattað. Tað er umráðandi, at lønin er eitt mál millum partarnar í vinnuni og ikki ein politiskur spurningur um skatt.

Tá tað er sagt, er vert at viðmerkja, at ikki bert í Føroyum verða sjómenn skattaðir lagaligari enn onnur. Tað er mær vitandi eisini so í t.d. Noregi og Íslandi - og hvørki av hesum londum verða stuðlað uttaneftir.

### Nógv tilfar til kjak

Nú veit eg ikki, um eg havi fingið fatur í øllum búskaparligum argumentum um omanfyristandandi evni, men har er ovmikið av tilfari í teimum til eitt gott og rímuligt búskaparligt kjak - uttan at tað gerst neyðugt at fara eftur mannin heldur enn bóltinum.

# Grundlóg teirra veiku

**Jón Ellendersen**



1. Børn við DAMP, atferðartrupulleikum, vánaligum sosialum korum o.tl. eiga rættin til stórri umsorgan enn "frísk" børn; tey eiga rættin til mannsømilig kor og rættin til, at teimum verður tryggjað eitt optimalt lív í Føroyum. Somuleiðis eiga tey rættin til, at føðilandið ikki vísir tey frá sær.

2. Menningartarnað, tey, ið hava DOWN syndrom e.tl. eiga rættin til optimala menning, góðar og tryggar møguleikar at luttaka í samfelagslívinum á jøvnum føti við øll onnur; tey eiga rættin at verða vird sum fullborin menniskju og sum heilir persónar; tey eiga rættin til somu búkor sum onnur og rættin til, at føðilandið gevur teimum tað í kompensasjón, sum tey ikki sjálvi eru før fyri at vinna sær.

3. Rørslutarnað eiga rættin til atkomu á øllum støgum á jøvnum føti við tey, íð einki rørslutarn hava; tey eiga rættin til fulla kompensasjón fyri rørlsutarnið, hetta við neyðugum hjálpartólum; tey eiga rættin til at luttaka á arbeiðsmarknaðinum á jøvnum føti við onnur og rættin til at fáa eins góða útbúgving og onnur eftir egnum ynski.

4. Sinnisveik /sinnissjúk eiga rættin til alla neyðuga hjálp, bæði medisinska og sosiala; tey eiga rættin til at verða vird á jøvnum føti við onnur, so veikleiki ella sjúka teirra ikki gerst ein foring fyri, at tey kenna seg sum fullgóð menniskju; tey eiga rættin til menning, útbúgving og eitt optimalt privatlív, har egin ynski verða sett hægri enn ynskini hjá stovni, sjúkrahúsi ella avvarðandi.

5. Heilaskadd eiga rættin til optimala afturvenjing, har alt verður sett inn á at afturvinna teimum tað lívið, skaðin hevur tikið frá teimum; tey eiga rættin til í mest møguligan mun at kunna venda aftur til tað arbeiðslív, tey høvdu áðrenn skaðan; tey eiga rættin til bústaðarmøguleikar, har íbúðin/ húsini verða innrættaði soleiðis, at tey kunnu ferðast sum áður í mest møguligan mun; tey eiga rættin til at verða vird sum tey menniskju, tey vóru áðrenn skaðan.

6. Okkara eldur, hvørt tey eru óhjálpin vegna aldur, barndømi, Alzheimer ella aðra sjúku, eiga fullan rætt til eitt mannsømandi lív til seinasta andadrátt; tey eiga rættin til at veit leggja dent á at tey kunnu varveita fulla virðing fyri sær sjálvum og frá øðrum. Tey eiga undir ongum umstøðum at kenna, at samfelagið ikki longur hevur brúk fyri teimum, men ístaðin, at samfelagið alt virðir og gleðist um tað, tey hava lagt eftir seg. Tey eiga rættin til, at tey gomlu ikki verða mett sum ein byrði, men ístaðin sum ein gáva.

7. Annars eiga øll, sum vegna likamliga ella sálarliga sjúku ella á annan hátt, ikki longur megna at luttaka í samfelagslívinum - eisini sosialt, eiga rættin til, at mest møguligt verður gjørt fyri, at tey framvegis kunnu kenna seg sum fullgóðir borgarar, at tey enn hava sama virði sum áður; tey eiga rættin til, ikki at gerast einsamøll vegna sjúkuna og rættin til best møguliga viðgerð á einhvønn hátt.

8. Samfelagið, tvs. hin einstaki føroyingurin, løgtingi, landsstýri, heilsuverk og almannaverk og annars allir stovnar, ráð v.m., sum løgting og landsstýri vara av, hevur felags ábyrgd av, at grein 1 til og við 7 verða uppfyltar og fylgdar so langt til ber. Eru aðrar íløgur, sum ikki beinleiðis ávirka tað almennu vælferðina, og soleiðis eisini kann raka tey, ið eru nevnd í grein 1 til og við 7 ein forðing fyri, at grundlógin verður hildin, eiga hesar íløgur at víkja fyri íløgum, sum eru hesum (í grein 1-7) at frama.

***vegna Føroya fólk og tær almennu Føroyar***